FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

Ikki færri enn 211 bátar seldu góð 153 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Størsti parturin, 109 tons, vórðu seld á Toftum. 41 tons vórðu seld í Klaksvík, meðan góð 3 tons vórðu seld í Vági

| Syslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | SIRIÐ | SNELLA | 408 |
| FD 101 | STRANDINGUR | LÍNA | 31 |
| FD 108 | DANITA | SNELLA | 618 |
| FD 124 | MÚLATINDUR | SNELLA | 627 |
| FD 136 | LILJA | SNELLA | 2.250 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 798 |
| FD 152 | KROSSTÚGVAN | SNELLA | 224 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 1.492 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 670 |
| FD 176 | HELEN | SNELLA | 582 |
| FD 183 | VÍGDIS | SNELLA | 392 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 2.396 |
| FD 216 | SIGGA | SNELLA | 175 |
| FD 229 | CAMILLA | SNELLA | 180 |
| FD 235 | STREYMSTEINUR | SNELLA | 412 |
| FD 237 | EYÐ | SNELLA | 803 |
| FD 25 | MASCOT | LÍNA | 480 |
| FD 250 | HALGERÐ | LÍNA | 350 |
| FD 263 | RÚNI | SNELLA | 634 |
| FD 309 | KUMLABOGI | SNELLA | 526 |
| FD 310 | SJÓBERIN | LÍNA | 32 |
| FD 312 | BRODDUR | SNELLA | 589 |
| FD 316 | ANNFRÍÐ | SNELLA | 684 |
| FD 322 | KLETTUR | SNELLA | 682 |
| FD 324 | VÁTANES | SNELLA | 593 |
| FD 359 | NíSAN | SNELLA | 782 |
| FD 380 | AMANDA | SNELLA | 1.788 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 1.133 |
| FD 444 | HJØLLUBÁTURIN | SNELLA | 573 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 672 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 95 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 5.643 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 1.696 |
| FD 564 | HAVGÁSIN M/B | SNELLA | 536 |
| FD 571 | DURITA | SNELLA | 285 |
| FD 608 | LAMBANES | SNELLA | 254 |
| FD 65 | EIK HELGADÓTTIR | SNELLA | 726 |
| FD 660 | FALKURIN | SNELLA | 453 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | SNELLA | 704 |
| FD 68 | ROYNDIN FRÍÐA | SNELLA | 1.117 |
| FD 72 | YLINT | SNELLA | 36 |
| FD 733 | RIVTANGI | SNELLA | 814 |
| FD 750 | BRIMNES | SNELLA | 485 |
| FD 753 | MARIA | LÍNA | 117 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 821 |
| FD 77 | IRDI | SNELLA | 773 |
| FD 783 | GLÚPUR | SNELLA | 1.223 |
| FD 80 | NORÐBÚGVIN | SNELLA | 797 |
| FD 800 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 1.329 |
| FD 808 | ALMA | SNELLA | 569 |
| FD 812 | GEIRHÓLMUR | SNELLA | 254 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | SNELLA | 347 |
| FD 865 | BÁRAN | SNELLA | 942 |
| FD 905 | TRÚGVI | LÍNA | 1.275 |
| FD 956 | ANJA | SNELLA | 481 |
| FD 966 | UNI | SNELLA | 436 |
| FD1046 | MIÐHAMAR | SNELLA | 319 |
| FD1054 | ALDUBÁRAN | SNELLA | 748 |
| FD1096 | RINGLASTEINUR | SNELLA | 236 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 197 |
| FD1137 | RIVTANGI | SNELLA | 1.054 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 2.108 |
| KG 106 | BARIÐ | SNELLA | 173 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 179 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 1.789 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 101 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 346 |
| KG 176 | SVARTBAKUR M/B | SNELLA | 950 |
| KG 276 | SKORHAMAR | SNELLA | 908 |
| KG 279 | NORÐBERG | LÍNA | 3.323 |
| KG 293 | FAGRAENNI | SNELLA | 1.411 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 2.733 |
| KG 349 | POLARSTJØRNAN | LÍNA | 902 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 1.545 |
| KG 423 | JASPISSTEINUR | SNELLA | 650 |
| KG 430 | BÁRAN | SNELLA | 190 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 82 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 618 |
| KG 477 | KVIKK | LÍNA | 602 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | SNELLA | 110 |
| KG 522 | SVARTABERG | SNELLA | 721 |
| KG 548 | ELIN H | SNELLA | 252 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | SNELLA | 1.071 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 1.691 |
| KG 608 | HERDIS | SNELLA | 98 |
| KG 63 | POLLUR | SNELLA | 172 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 3.119 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 323 |
| KG 666 | SJÓVARFOSSUR | SNELLA | 289 |
| KG 681 | NESTINDUR | SNELLA | 752 |
| KG 706 | SKÝLISKLETTUR | SNELLA | 818 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 569 |
| KG 741 | TRÝ SYSTKIN | SNELLA | 271 |
| KG 743 | ELSA | SNELLA | 459 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 2.640 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 1.311 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 393 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 120 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 215 |
| SA 106 | SVANANES | SNELLA | 257 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 1.561 |
| SA 215 | BIRTU LIAS | SNELLA | 295 |
| SA 26 | BÁRÐARENNI | SNELLA | 547 |
| SA 280 | SNIGÁLVUR | SNELLA | 283 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 255 |
| SA 38 | VESTURBERG | SNELLA | 1.145 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 711 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 311 |
| TG 122 | FRÍÐHILD | SNELLA | 665 |
| TG 174 | TURIÐ | SNELLA | 212 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 391 |
| TG 20 | HEIMDAL | SNELLA | 849 |
| TG 22 | HAVGÁSIN | SNELLA | 255 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 655 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR | | |
| | V/H. JOENSEN | SNELLA | 683 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 1.042 |
| TG 310 | SJÓRIDDARIN | SNELLA | 684 |
| TG 347 | KNÚKIN | SNELLA | 532 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 516 |
| TG 376 | DÚGVAN | SNELLA | 1.049 |
| TG 397 | KVIKK | SNELLA | 479 |
| TG 40 | KAMBUR | SNELLA | 920 |
| TG 435 | JÓRUN | SNELLA | 224 |
| TG 460 | MARIANN | SNELLA | 515 |
| TG 471 | NÚPUR | SNELLA | 412 |
| TG 495 | EGIL M | SNELLA | 588 |
| TG 508 | MAGNHILD | SNELLA | 24 |
| TG 56 | MARIAN M. | SNELLA | 1.440 |
| TG 562 | TODNES | SNELLA | 567 |
| TG 597 | TORSTEIN | SNELLA | 342 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 1.047 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 1.139 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 2.295 |
| TG 632 | VØRÐAN | SNELLA | 257 |
| TG 650 | NÍPAN | SNELLA | 169 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 273 |
| TG 731 | ANNIE M/B | SNELLA | 781 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 284 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 1.033 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 473 |
| TN 136 | BÚGVIN | SNELLA | 519 |
| TN 149 | ØRVUR | SNELLA | 520 |
| TN 164 | BORGARKLETTUR | SNELLA | 1.714 |
| TN 213 | LÍRABERG | SNELLA | 393 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 428 |
| TN 288 | INGA MARETA | SNELLA | 500 |
| TN 325 | RÁDNI | SNELLA | 714 |
| TN 329 | NEPTUN | SNELLA | 167 |
| TN 381 | SANCY | SNELLA | 253 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | SNELLA | 510 |
| TN 460 | BRATTANES M/B | SNELLA | 430 |
| TN 56 | ÁLAFOSSUR | SNELLA | 397 |
| TN 647 | SÍLIÐ | SNELLA | 1.274 |
| TN 705 | BRESTIR | BOTNTROL | 167 |
| TN 707 | FLUNDRAN | SNELLA | 433 |
| TN 718 | HVÍTABERG | SNELLA | 281 |
| TN 723 | BRATTASKORÐ | SNELLA | 613 |
| TN 728 | PANDY | SNELLA | 438 |
| TN 734 | KÓPASKER | SNELLA | 141 |
| TN 752 | TVEY SYSTKIN | SNELLA | 929 |
| TN 753 | TÓRA | SNELLA | 564 |
| TN 81 | THOMMAS | SNELLA | 1.876 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | SNELLA | 1.653 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 288 |
| TN 844 | BRANDUR | SNELLA | 561 |
| TN 886 | LEIKUR | SNELLA | 408 |
| TN 892 | NØVAN | SNELLA | 489 |
| TN 897 | MAJ-N | SNELLA | 777 |
| TN 91 | LÓMUR | SNELLA | 344 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 485 |
| TN 964 | HVÍTIFOSSUR | SNELLA | 186 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 538 |
| TN 979 | BRYNHILD | SNELLA | 1.167 |
| TN 983 | JUVEL | SNELLA | 117 |
| TN 992 | ÁRNASTEINUR | SNELLA | 1.093 |
| TN1018 | VALKYRIE | SNELLA | 49 |
| TN1053 | KJÓGVIN | SNELLA | 733 |
| TN1071 | GUÐRIÐ | SNELLA | 189 |
| TN1099 | LENA | SNELLA | 338 |
| VA 143 | THURID | SNELLA | 428 |
| VA 190 | SJÓBERIÐ | SNELLA | 1.810 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 1.267 |
| VA 269 | ANNA MARIA M/B | SNELLA | 1.468 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 1.393 |
| VA 287 | SÓLVÁ | SNELLA | 1.334 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 1.052 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | SNELLA | 1.164 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 1.425 |
| VN 125 | ÆGIR | SNELLA | 495 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 293 |
| VN 136 | SÆVAR | SNELLA | 755 |
| VN 152 | SJÓARFOSSUR | SNELLA | 931 |
| VN 157 | EYÐBJØRG | SNELLA | 213 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 216 |
| VN 255 | ELSA M/B | SNELLA | 1.080 |
| VN 267 | JENNY M/B | SNELLA | 396 |
| VN 309 | ATLANTA | SNELLA | 737 |
| VN 339 | KOLLAFJ. HANUS | SNELLA | 1.000 |
| VN 350 | TERJÁ | SNELLA | 86 |
| VN 378 | TURIÐ | SNELLA | 695 |
| VN 405 | KRABBIN | SNELLA | 820 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 2.013 |
| VN 409 | NORÐBERG | SNELLA | 508 |
| VN 425 | HALLA | SNELLA | 178 |
| VN 433 | SJÓLØVAN | SNELLA | 209 |
| VN 447 | FRÍÐGERÐ | SNELLA | 753 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 418 |
| VN 464 | FLÁABERG | SNELLA | 437 |
| VN 478 | GURLI | SNELLA | 213 |
| VN 496 | REYNI | SNELLA | 469 |
| VN 513 | KLETTUR | SNELLA | 127 |

| Vørunavn | kilo | | |
|---|---|---|---|
| TOSKUR 2 | 20.457 | HÝSA 1 | 738 |
| TOSKUR 3 | 72.940 | BROSMA 0 | 19 |
| TOSKUR 4 | 33.203 | | |
| TOSKUR 5 | 4.682 | BROSMA 3&4 | 367 |
| TOSKAROGN | 7.419 | LONGA 4&5 | 12 |
| SIL | 3.311 | UPSI 4 | 2 |
| LIVUR | 19 | HÝSA 0 | 15 |
| UPSI 0 | 1.732 | UPSI 3 | 58 |
| KONGAFISKUR 0 | 52 | SKRUBBA | 117 |
| KALVI 4 | 28 | BLÁLONGA 1 | 8 |
| REYÐSPRØKA 0 | 184 | UPSI 1 | 476 |
| TOSKUR 1 | 4.114 | UPSI 2 | 492 |
| HÝSA 2 | 1.159 | LONGA 1 | 26 |
| HÝSA 3 | 407 | LONGA 2 | 68 |
| HVÍTINGUR 0 | 326 | KALVI 5 | 1 |
| STEINBÍTUR | 378 | LÝSINGUR | 12 |
| LIRI | 14 | KONGAFISKUR 4 | 27 |
| HAVTASKA 0 | 272 | KALVI 2 | 11 |
| SKØTA | 20 | LONGA 3 | 96 |
| HÝSA 4 | 102 | SVARTKALVI 0 | 7 |
| HÝSA 5 | 11 | SKØTURAVAR | 114 |
| BROSMA 2 | 18 | HÁVUR | 31 |
| LONGA 0 | 16 | | |



# Nýggj rækjuskip ikki væl komin

*stinus ivsson*
*i sgaar*

»Tað er ikki rætt at geva fleiri rækjuloyvi nú alt er rættuliga ótrygt og ógreitt hjá hesi vinnu. Í mars fer NAFO av avgera um rækjuveiðan á Flemmish Cap skal kvoterast og norðmenn hava biðið ICES um at taka rækjustovnin við Svalbard í teirra felagsskap og verður lurtað eftir ICES, so merkir tað vanliga, at fiskiveiðan skal skerjast. Tí er tað burturvið, at fiskimálaráðharrin Jørgin Niclasen økir veiðuorkuna við so stórum skipum sum Ocean Pride, sigur Jákup Egholm Hansen, formaður í Felagnum Rækjuskip.

Felagið Rækjuskip hevur gjørt fiskimálaráðharranum Jørgin Niclasen greitt, at vandi er á ferð, koma fleiri rækjuskip í flotan.

– Sjálvandi hevur felagið Rækjuskip ongan áhuga í, at ein rúgva av ónýttum fiskidøgum liggja við Svalbard og í russiskum sjógvi, men hesir dagar kunnu eisini roknast sum ein eykatrygd hjá verandi rækjutrolarum á Flemmish Cap, sigur Jákup Egholm Hansen.

Útlitini á Flemmish Cap eru nevniliga ikki alt for bjørt. NAFO hevur longu ásett fund at vera hildnan í komandi mána, har avgerast skal um fiskidagarnir skulu avtakast og kvota skal setast í staðin. Tað stendur í hvussu er fast, at veiðutrýstið á ein ella annan hátt skal minkast á Flemmish Cap soleiðis at tað merkist. Antin verða fiskidagarnir skornir niður ella verður kvota sett á.

– Og tá útlitini á Flemmish Cap ikki eru so bjørt, so er gott hjá rækjubátunum at vita, at fiskidagar eru at heinta á Svalbardsleiðini og í Barentshavinum. Eg skilji ikki fiskimálaráðharran. Tveir undanfarnir fiskimálaráðharrar, Ivan Johannesen og John Petersen góvu ikki eitt einasta rækjuloyvi afturat, júst tí at teir óttaðust gongdina á Flemmish Cap. Nú allarhelst stórar broytingar vera í fiskimøguleikunum bæði á Flemmish Cap og við Svalbard, so gevur fiskimálaráðharrin ikki bara loyvi, har skip verður skift út við skip, men eisini loyvi til heilt nýggj fiskiloyvi, til stór skip við veldugari veiðiorku, sigur Jákup Egholm Hansen.

Hann leggur aftur at at norðmenn herfyri skerdu fiskadagatalið einsíðugt niður í eina helvt.

Føroyingar veiddu 7760 tons av rækjum á Flemmish Cap í fjør. At talið er so lágt kemst av at Sólborg stóran part av árinum varð leigað til Grønlands og at gamli Hvilvtenni varð seldur áðrenn nýggi Hvilvtenni kom til landið.

## Seismikkur órógvar ikki varandi

*stinus ivsson*
*i sgaar*

Fiskirannsóknarstovan sendi í fjør spurnarbløð til fiskiflotan fyri at vita hvussu nógv seismikk spreingingar órógvaðu fiskiflotan. Hetta gjørdu stovan eftir at klagur vóru komnar um virksemið hjá seimmikkskipum. Samstundis eru veiðutølini kannaði fyri tey økini, har seismikkur er skotin.

Niðurstøðan er, at seismikkur órógvar, fiskurin verður stygdur, men at hann kemur aftur á somu leið stutt eftir.

– Tað vilja altíð vera ójavnir fiskidagar og tað er ikki til at siga um tað er seismikkum ella onnur viðurskifti, sum hava ávirkað, at lítið hevur verið at fingið, tá seimmikkur er skotin. Eitt er tó fast, seismikkur gevur ikki varandi trupulleikar har fiskað verður, sigur Hjalti í Jákupstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

73 prosent av teimum spurdu svaraðu, at teir hildu at seismikkkanningar órógvaðu fiskiskapin. Tvey prosent søgdu, at teir høvdu fingið meira fisk, har seismikkskip var á leiðini. Onkur hevði gjørt eitt rimmar toskahál, tá hann togaði í móti, har fiskur flýddi undan seismikkskot-

## Stovnsmetingar ongan áhuga

Hyggja vit eftir svørunum sum fiskimaðurin gevur Fiskirannróknarstovuni, so eru stovnsmetingar ikki tað sum hevur hansara størsta áhuga.

– Fiskivinnan hevur størstan áhugan í at vita um hitan í sjónum, tí hesir sigur hvar ein skal royna eftir teimum ymisku fiskasløgunum, segði Hjalti í Jákupstovu, á fundinum sum Fiskirannsóknarstovan helt fyri vinnuni í seinastu viku.

Spurnarbløðini hjá Fiskirannsóknarstovuni vísa eisini at vinnan heldur at tað sum fiskifrøðingar siga er ov torskilt. Men fiskimenn eru samdir um, at vit eiga ikki at niðurleggja Fiskirannsóknarstovuna.

**je**

## Íslendingar fiska minni á Flemmish Cap

Av teimun 49,637 tonsunum av rækjum, sum vóru veidd á Flemmish Cap í fjør veiddu íslendingar bert 9910 tons. Estlandi, sum liggur á odda veiddi 18 prosent av kvotuni, ella 12,196 tons. Hetta skrivar íslendska vevsíðan Interseafood.

Upplýsningarnir koma frá NAFO. Veiðan á Flemmish Cap økist. Í fjør vórðu veidd 6,200 tons meira enn í 1999. Gamla metið er frá 1996, tá 48.299 tons vóru veidd.

Føroyar liggja á einum triðja plássi í rækjuveiðuni á Flemmish Cap. Í fjør veiddu føroyingar 7745 tons. Fremsta landið er sum sagt Estland við 12,196 og síðan kemur ísland við 9910 tonsum, Føroyar og síðan Rusland við 7078 tonsum. Hini londini sum hava veitt á Flemmish Cap eru Lithauen 3528 tons. Letland 3102 tons, Noreg 2633 tons, ES 1825, Grønland 1638 tons, Kanada 618 tons Poland 316 tong og Kuba 46 tons.

Í 1996 veiddi Ísland 20,681 tons á Flemmish Cap ella 46 prosent av heildarveiðuni.

## Toskurin í menning í Barentshavinum

Molde(NTB)Toskastovnurin í Barentshavinum er í menning og saman er galdandi fyri hýsuna. Hetta úrslitið er norska Havforskningsinstituttet komið til, eftir at fiskirannsóknarskipini G.O. Sars, Johan Hjort og russiska Persey 4 eru liðug við yvirlitstrolingarnar fyri í vetur.

Hesuferð eru øll tey týdningarmiklastu økini í Barentshavinum kannaði, eisini í russiska partinum av Barentshavinum.

Hvat toski viðvíkur sigur Havforskningsinstituttet, at fimm og seks ára gomlu árgangirnir eru best fyri. Lítið er til av eldri fiski og støðan hjá teim yngru árgangunum er nakað undir miðal, stendur at lesa á norsku vevsíðuni Interseafood.

2000 árgangurin er undir miðal og 1999 árgangurin er veikur.

Hóast yngru árgangirnir eru veikir, so eru positiv tekin at síggja. Fyri toskin, so hava livilíkindini verið góð og tí er yngulin vaksin skjótt, tað merkir at meira kemur undan av hesum fiski, enn vanligt.

Hýsustovnurin er væl fyri.

